## Nýggja country-stjørnan

Hallur Joensen er heitasta navnið í føroyskum tónleiki í løtuni. Hann hevur júst givið fløgu út, sum hevur selt óvanliga nógv hesa fyrstu vikuna. Næstan 2.000 fløgur eru seldar eftir fáum døgum, og tað er óhoyrt í nýggjari tíð. Leygarkvøldið hevur Hallur Joensen útgávukonsert, og hann fer at syngja sangir av nýggju útgávuni til Straight Parade. Við sær hevur hann eina paradu av góðum tónleikarum.



## Hjarnar í alla nátt

Karl Martin Samuelsen og hansara menn í Hjarnum duga at blása fólk um koll við góðum rocktónleiki. Til Straight Parade fara teir at savna sítt besta tilfar og blása tað út til fólkið. Sangir sum Alla Nátt, So Excited, Breaking My Heart og aðrir verða at hoyra, tá ið Hjarnar – við Jørgen Dahl – fara á pallin leygarkvøldið.

# vápnini fram aftur

*Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags fara at hava enn eina av sínum sermerktu framførslum leygarkvøldið. Mynd: Álvur Haraldsen*





*Hallur Joensen hevur útgávukonsert til Straight Parade. Mynd: Høgni Thomsen*

*Jógvan Olsen verður á pallinum saman við Hjarnum, og hann skal eisini spæla við Hallur Joensen. Mynd: Høgni Thomsen*



### Svakligt show

Ólavur Klakk er nakað fyri seg í føroyskum tónleiki. Tá ið hann gerst til Ólavur Presley í bólkinum Rag Rags kann eingin steðga honum, og soleiðis verður eisini hesaferð.

- Tað verður akkurát soleiðis, sum fólk rokna við, at tað verður. Ólavur Presley hevur altíð verið svakur, og tað fer hann eisini altíð at verða. So fólk fáa eitt ordiligt show og eitt ræðuligt ýl, sigur Ólavur Presley.

- Rag Rags spæla so sjáldan longur, men tá Statshospitalið letur dyrnar upp, so fara vit út og spæla eina konsert, sigur hann.

Ólavur Presley hevur roynt bæði eitt og annað, tá ið hann hevur verið á palli við Rag Rags. Einaferð skuldu teir lata, sum um hann bleiv hongdur, men tað gekk heilt ikki heilt eftir vild, og Ólavur kom illa fyri á pallinum.

- Eg misti ikki lívið ta ferðina, so eg kann spæla aftur leygarkvøldið, men vit fara ikki at royna at heingja meg aftur. Tað verður undirhald og tónleikur, og Rag Rags er ein bólkur, sum skal upplivast, sigur Ólavur Presley.

Umframt Rag Rags verða eisini Dynamitt, Hjarnar, Hallur Joensen og Jørgin Dahl at hoyra á Straight Parade tiltakinum. Eisini fara tveir bólkar, sum eru valdir út á konsert í Virkishúsinum, at hita upp.

Straight Parade byrjar leygarkvøldið kl. 22.00.